## Tvær kvinnur í stjórn

Landsfundurin hjá Siumut, sum endaði um vikuskiftið, valdi tvær kvinnur í stjórnina í flokkinum. Doris Jalobsen, sum situr í Landstinginum, varð vald til politiskan næstformann, og borgarstjórin í Narsaq, Kista P. Isaksen, varð vald til umsitingarligan næstformann. Tey flestu høvdu væntað, at Aleqa Hammond, landsstýriskvinna, fór at stilla upp til starvið sum politiskur næstformaður, eftir at hon tapti formansvalið ímóti Hans Enoksen tepurt.



## Motzfeldt frá

Jonathan Motzfeldt er ikki limur í floksleiðsluni hjá Siumut longur. Á landsfundinum í síðstu viku fór hann frá. Í einari røðu fyri fundarfólkinum segði Jonathan Motzfeldt, at hann legði frá sær við góðari samvitsku, tí at hann helt seg hava gjørt sína politisku herskyldu. Hans Enoksen, floksformaður, takkaði Jonathan og segði, at hann er og verður landsfaðirin hjá flokkinum og grønlendingum yvirhøvur. Motzfeldt heldur fram í Landstinginum.

# Atlantic Petroleum 10 ár

**- Vit hava nú 10 ár á baki, og í hesi tíðini hava vit bygt upp eitt altjóða oljufelag, sum er vorðið rættiliga stórt í føroyskum høpi og er skrásett á tveimum marknaðum, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum**

OLJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- So leingi, sum leitað verður eftir olju í føroyskum øki, eru avgjørt eisini vónir um at finna olju. Eingin hevði brúkt so nógvan pening upp á leiting við Føroyar, um útlit ikki vóru til at finna olju, sigur stjórin í Atlantic Petroleum*

Í dag fyllir Atlantic Petroleum 10 ár.

Ætlanin er ikki at gera nakað serligt burtur úr degnum beint nú, men stjórin, Wilhelm Petersen, sigur, at teir ætla at leggja føðingardagin saman við einum øðrum stórum degi í søgu felagsins.

- Vit fara at framleiða olju nakað skjótt, og tí ætla vit at taka bæði tiltøkini undir einum.

Stjórin vísir á, at felagið hevur tvey øki, sum skulu undir framleiðslu í næstum.

- Í løtuni er ikki heilt greitt, um fyrra økið fer undir framleiðslu seinast í hesum fjórðingsári – ella tíðliga í øðrum fjórðingsári. Í øllum førum er greitt, at fyrra framleiðsluøkið fer í gongd í fyrra helmingi av árinum – og hitt seinna miðskeiðis í árinum.

Atlantic Petroleum hevur keypt seg inn í oljuleiðir í Norðsjónum, og tað er Chestnut-økið, ið verður tað fyrsta, sum fer undir framleiðslu.

Hummingbird-pallurin er hann, sum kemur at taka fyrstu oljuna upp úr undirgrundini, har eitt føroyskt felag er við.

Wilhelm Petersen sigur seg fegnast um, at Atlantic Petroleum sum fyrsta føroyska felagið nú verður partur av veruligari oljuframleiðslu.

- Vit hava nú 10 ár á baki, og í hesi tíðini hava vit bygt upp eitt altjóða felag, sum er vorðið rættiliga stórt í føroyskum høpi og er skrásett á tveimum marknaðum.

Stjórin sigur, at tá ið tað hevur drigið út at finna olju í føroyskum øki, hevur verið umráðandi fyri Atlantic Petroleum at leita út um landoddarnar.

Vit spurdu eisini Wilhelm Petersen, hvørjar vónir hann hevur um at finna olju í føroysku undirgrundini.

- So leingi, sum leitað verður eftir olju í føroyskum øki, eru avgjørt eisini vónir um at finna olju. Eingin hevði brúkt so nógvan pening upp á leiting við Føroyar, um útlit ikki vóru til at finna olju, sigur stjórin í Atlantic Petroleum.

Tað vóru upprunaliga 18 privatir íleggjarar, sum stovnaðu føroyska oljufelagið.

Atlantic Petroleum byrjaði í tí smáa í Føroyum við vón um eina skjóta føroyska oljuvinnu, men tá ið tað dróg út við at finna olju í rakstrarverdum nøgdum, fór felagið til verka uttanfyri landoddarnar við oljuleiting og uppkeypi av veruligum oljuleiðum.

Hetta hevur so ført við sær, at felagið í dag er vorðið eitt føroyskt altjóða felag við virksemi í Føroyum, Onglandi og Írlandi.



*Fagraberg kemur á Fuglafjørð týskvøldið við fullari last*
*Mynd: Fagraberg*

# Fagraberg fullfermdur

**Lastin er full, og leiðin er løgd heim til Føroya. Gongst, sum ætlað, verður Fagraberg á Fuglafirði týskvøldið**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir, sum sigla við svartkjaftatrolaranum Fagrabergi, lótu okkum sunnukvøldið vita, at skipið nú er fult, og leiðin er løgd heim til Føroya við lastini.

- Vit hava fult skip og eru nú á veg heim at landa.

Fagraberg, sum er fyrrverandi Krúnborg, hevur umleið 3.150 tons av svartkjafti, og teir verða ætlandi á Fuglafirði týskvøldið.

Seinastu tíðina hava svartkjaftaskipini roynt á leiðini vestur úr Írlandi.

Sum februar mánaði gongur, byrjar svartkjafturin at taka seg norðureftir, og sum tíðin líður, verður styttri hjá føroysku skipunum at sigla heim til Føroya við veiðini.

Tá ið komið er út á várið, er svartkjafturin komin í føroyskan sjógv.

# Noreg: Økt eftirlit á sjógvi og landi

**- Tú skalt ongantíð vera vísur í, at veiða, reiðskapur ella landing ikki verður kannað, sigur Aksel Eikemo**

EFTIRLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ovveiða, útblaking av fiski, "svartar" landingar og ólóglig hjáveiða.

Hetta verður høvuðsmálið hjá norsku fiskivinnuumsitingini í 2008. Eisini fiskiídnaðurin fer at merkja økta eftirlitið.

Sum skilst, fara norska fiskivinnuumsitingin og fiskiveiðieftirlitið at leggja hart út í hesum ári.

Málið verður at skerpa eftirlitið við veiði eftir ávísum fiskasløgum, eins og eftirlitið við russiskum og øðrum skipum verður hert.

Sambært norska Fiskeribladet, er hetta fyrstu ferð, at fiskiveiðimyndugleikarnir beinleiðis boða frá, at eftirlitið – bæði á sjógvi og landi - nú verður skerpað.

- Í fjør høvdu vit russisku ovveiðina í Barentshavinum ovast á breddanum. Nú halda vit, at tíðin er komin til, at bæði vaktarskip, sølufeløg og fiskiveiðieftirlitið skulu takast upp á ráð í royndini at finna fram til, hvørji fiskasløg serliga skulu havast undir skerpaðum eftirliti.

Tað sigur ein av stjórunum í norsku fiskivinnuumsitingini, Aksel Eikemo.

- Tú skalt ongantíð vera vísur í, at tín veiða, reiðskapur ella landing ikki verður kannað, leggur hann dent á.

*Aksel Eikemo er ein av stjórunum í norsku fiskivinnuumsitingini*

